## Dýrur farmur

Eitt skip hjá bretska herflotanum fekk góðan fong, tá tað steðgaði einum fiskiskipi úti fyri suðuramerikonsku strondini fyrr í hesum mánaðinum. Nakað úr landi kom herskipið HMS Iron Duke fram á eitt fiskikip, og tá menn av herskipinum fóru umborð á fiskiskipið, funnu teir 5,5 tons av rúsevninum kokain í kastini. Tað sigur bretska verjumálaráðið, sum hevur fingið at vita, at á gøtuni er kokainið næstan tvær milliardir krónur vert. Skiparin á HMS Iron Duke, Andrew Stacey, sigur, at hetta er størsta rúsevnafongur hjá teimum nakrantíð. Hann vil ikki siga, hvar teir komu fram á fiskiskipið.



## Fjall á botni

Amerikanskir og kanadiskir granskarar hava funnið eitt fjall á havbotninum í tí arktiska økinum, og tað kann fáa týdning, tá havleiðirnar kring Norðpólin eina ferð skulu býtast millum londini í økinum. Granskararnir eru við tveimum skipum, sum kanna og skráseta havbotnin norðan fyri Alaska og Yukon-økið, og har hava teir funnið eitt 1.100 metrar høgt fjall, sum eingin visti um. Amerikanskir og kanadiskir talsmenn siga, at fjallið á botni hevur stóran týdning, nú londini royna at fáa staðfest, hvør hevur rætt til hvat í økinum kring Norðpólin.



*Regin Jacobsen, stjóri, Líggjas í Bø, nevndarformaður, og Hans Jacobsen tóku ímóti heiðrinum at gerast Ársins virki 2009*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Bakkafrost er Ársins virki 2009

**Bakkafrost var longu framman undan mett sum eitt gott boð upp á Ársins virki 2009, og tað vísti seg eisini at halda. Ein fegin stjóri gav starvsfólkunum ærina fyri tann heiðurin, sum vístur varð virkinum**

ÁRSINS VIRKI

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fleiri av teimum spurdu í Sosialinum hósdagin peikaðu á Bakkafrost sum eitt gott boð upp á Ársins virki, og tá spenningurin var loystur fríggjadagin, stóð Regin Jacobsen við standmyndini í hondini sum sjónligt prógv fyri, at Bakkafrost varð kosið Ársins virki 2009.

Í grundgevingini fyri at velja Bakkafrost sigur dómsnevndin soleiðis:

»Við val av ársins virki skal metingarnevndin taka sína støðu út frá hesum krøvum:

- Virkið skal hava víst framfýsni og áræði innan eitt nú útflutning, vørumenning, tøknifrøði, útbúgving ella innan annað øki, og hetta skal eftir styttri áramál hava viðført menning og vøkstur,
- Virkið skal hava verið støðugt/vaksandi, og dentur verður lagdur á fíggjarligt úrslit seinastu árini,
- Virkið skal vilja trína alment fram sum vinnari av kappingini sum Ársins virki.

Fyrsta metingarkravið hjá nevndini byggir á ta sannroynd, at alt er í broyting, og at okkara framtíð veldst um, hvussu vit síggja hesar broytingar og møguleikarnar í teimum, og hvussu væl vit tora og duga at handla. Umframt at seta mál í broyttu støðuni, mugu vit eisini rætta fyritøkuna til og fáa okkara samstarvsfyritøkur og myndugleikar at broyta almennu karmarnar samsvarandi hesum.

At hóra undan í broytingartíðum og finna nýggjar leiðir er ein styrki hjá føroyskum fyritøkum. Skjótt at síggja aðrar møguleikar og leiðir at ganga – sámuliga léttgongdar til broyting kemur í; eisini har. Óvanligari er í broytingartíðum at skoða longri fram og við gjørdum royndum og styrkjum í fyritøkuni at leggja eina strategiska ætlan fyri fyritøkuna og halda fast um hana, sjálvt um aðrar fyritøkur innan nakað somu vinnugrein til tíðir kunnu fáa størri inntøku við aðrari, valdari leið.

Vit fáa støðugt fleiri av hesum fyritøkum, ið meta um, hvør heildarstrategi best kann byrgja upp fyri óvissum, ið tær kunnu hava ávíst ræði á, og sum við valdu strategiini fáa tann stabilitet og effektivitet í rakstrinum, sum gevur vøkstur og framhaldandi menning av fyritøkuni.

Ein av hesum fyritøkum er Bakkafrost. Á Bakka hevur verið vinnuligt virksemi í kanska 100 ár ella meira bygt upp á tað, sum fjørðurin og havið hevði at geva. Tað er næstan ikki tað fiskaslag, sum ikki hevur verið virkað á Bakka, ið eisini tíðliga kom upp í aling við øllum tí, sum fylgdi við her. Men í 1992 verður tann strategi løgd, sum hevur verið fylgd líka síðan, og sum hevur givið ta menning og tann vøkstur, at fyritøkan í dag er tann nógv største innan fiskaaling í Føroyum og er millum størstu útflutningsfyritøkurnar í landinum. At hava biologiska trygd, bæði veterinert og tá tað snýr seg um at fáa rávøru, at skapa jøvn og góð prísviðurskifti við miðvísari sølu beinleiðis vend til endabrúkaran, og at skapa jøvn og góð inntøkuviðurskifti við langsiktaðum samanhangi av allari virðisketuni, aling, liðugtframleiðslu og sølu, hevur verið tann strategi, sum hevur ført á mál.

Fyritøkan er í dag í samanlegging við Vestlax og fer eftir samanleggingina 1. januar komandi at ala eini 30.000 tons árliga, harav knappliga helvtin verður í retail-pakningi. Miðað verður eftir, at fyritøkan skal skrásetast á virðisbrævamarknaðinum í Oslo og verða burtur av altjóða fyritøka, við teimum krøvum um burðardygd og gott langsiktað avkast, ið eigararnir fara at krevja av henni. Fyritøkan hevði við seinastu ársuppgerð eina eginogn upp á 229 mió. kr. og eitt ársúrslit upp á 37 mió. kr. Starvsfólkatalið hevur verið støðugt vaksandi og var knappliga 300 við ársbyrjan.

Nevndin hevur tí ikki ivast í at valt PF Bakkafrost Holding til ársins virki 2009«.